VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

# Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 22.06.2021 kl. 18:00 |
| **Fundarstaður:** | |
| **Málnr.:** | 21/00003 |
| Til staðar: | Bjarni Prior, Martin Simonsen, Dagbjørn Hansen, Heðin Poulsen, Jónhard Selfoss, Tórdis Dam Johannesen, Ásla Leila Johansen, Jóhannus Hansen, Jens Gaardlykke, Jóanis Albert Nielsen, Herborg Gaardlykke |
| Varalimir: | Martin Simonsen, Heðin Poulsen og Jóhannus Hansen |
| Ikki til staðar: | Albert Ellefsen, Rósa Samuelsen og Sólfríð Fjallsbak |
| Aðrir partar: | |
| Fundarskrivari: | Jóhan Hendrik Ellefsen |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Kunning** | | | |
| 5/21 | 21/00105-9 | 6. Mál beind í nevnd 2021 | 3 |
| **Til støðutakan** | | | |
| 99/21 | 21/00197-4 | Ynski um yvirtøku av landsvegi og lending norðuri á Oyragjógv | 5 |
| 100/21 | 20/00803-6 | Umsókn at byggja summarhús á matr.nr. 375 í Sundshaga | 6 |
| 101/21 | 21/00217-8 | Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 289a í Miðvági, við frágreiðing | 8 |
| 102/21 | 21/00386-3 | Umsókn um byggiloyvi matr. nr. 4u í Sandavági | 9 |
| 103/21 | 21/00403-4 | Umsókn um byggiloyvi Dagmarsgøta 12 matr. nr. 287i í Miðvági | 10 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 104/21 | 21/00430-5 | Skipan av barna- og ungdómstilboðið í Vága kommunu | 11 |
| 105/21 | 21/00463-1 | Broyting av byggisamtyktini fyri partar av matr. nr. 227a, 227d, 227e, 227f, 227g, 227h og 227i í Miðvági | 12 |
| 106/21 | 21/00404-3 | Áheitan á býráðið, at geva borgarstjóranum heimild at bjóða øki út til fjølltáttaða íbúðarbygging | 13 |
| 107/21 | 21/00465-1 | Útbjóðing av arbeiðinum at gera 2. byggistig av skúlanum á Giljanesi | 14 |
| 108/21 | 21/00466-4 | Støðutakan til tilboð uppá niðurtøku av parti av gamla skúlabygninginum á Giljanesi, og hitaverk til ítróttarhøllina. | 15 |
| | | | |


Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

**Kunning**

## 5/21 6. Mál beind í nevnd 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 22.06.2021 | 5/21 |

**Málslýsing:**

**Býráðið 22. juni 2021:**

Formansváttan:

Formansváttan:_____________

VÁGA KOMMUNA

**Til støðutakan**

## 99/21 Ynski um yvirtøku av landsvegi og lending norðuri á Oyragjógv

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 08.06.2021 | 14/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 11.06.2021 | 62/21 |
| 3 Býráðið | 22.06.2021 | 99/21 |

**Málslýsing:**

Borgarstjórin biður býráðið um heimild til, at søkja Landsverk um yvirtøku av Oyrarjáarvegnum og lendingini á Oyrargjógv.

Eitt ávíst samskifti hevur verði millum borgarstjóra, umsiting og Landsverk, og er Landsverk áhuga at lata kommununi vegin og lendingina uttan nakran kostnað. Hetta er treytað av at kommunan yvurtekur vegin og lendingina í tí standi tey eru í.

**Vinnu- og havnanevndin 08. juni 2021:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 11. juni 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 22. juni 2021:**

Samtykt.

Formansváttan:____________

# 100/21 Umsókn at byggja summarhús á matr.nr. 375 í Sundshaga

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.06.2021 | 59/21 |
| 2 Býráðið | 22.06.2021 | 100/21 |

## Málslýsing:

Inga Johannusdóttir og Hans Jacob Joensen søkja um loyvi at byggja summarhús á matr.nr. 375 í Sundshaga, Sandavági.

**Viðmerking frá umsitingini:**

Økið søkt verður um loyvi at byggja á liggur í øki K1-Uttangarðs, og er ásetingin í byggisamtyktini fyri øki hendan:

1. K1-øki Uttangarðs
a) Økið er tað, ið eftir er av kommununi, tá ið frammanundan nevndu øki eru tikin frá, og verður tað nýtt til landbúnað, vakstrarhús, grótbrot, fiskaalistøðir o.a.

b) Loyvt er bert at byggja hús, ið neyðug eru til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum við endamálum, ið nevnd eru í 1. stk. Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telesamband og í sambandi við vegahald.

c) Hús og teknisk virki skulu vera soleiðis til útsjóndar og setast soleiðis í lendinum, at tey lýta landslagið minst gjørligt.

d) Tá talan er um byggiloyvi eftir hesi grein, skal neyv frágreiðing av virkseminum og váttanir liggja við umsóknini, og er byggiloyvi treytað av at byggivaldið góðkennir frágreiðingina.

a. Í samband við landbúnað skal lýsingin minst fevna um:

b. grundarlagi fyri virkseminum

c. hvussu rakstur verður skipaður

d. hvat slag av djórahaldi talan er um

e. hvussu stórt talið av djórum verður e) Í niðurløgdu bygdunum, er loyvt at byggja hús til bústað á verandi grundir, sambært pnkt. 6.

f) Bygging má einans fara fram, aftaná at loyvi er fingið frá friðingarmynduleikunum, sambært g) løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

Nevndin eigur at takað støðu til um kommunan skal loyva bygging av summarhúsum uttangarðs, tí um loyvi verður givið kann roknast við at fleiri umsóknir koma.

**Tekniska nevnd 08. juni 2021:**

Frámælt.

**Býráðið 22. juni 2021:**
Jóhannus Hansen luttók ikki í viðgerini.

Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd.

Formansváttan:______________

VÁGA KOMMUNA

## 101/21 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 289a í Miðvági, við frágreiðing

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.06.2021 | 60/21 |
| 2 Býráðið | 22.06.2021 | 101/21 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevu sent Vága kommunu umsókn um sundurbýti av matr. nr. 289a í Miðvagi til ummælis.

Talan er um at frábýta eitt økið, sum er 223 fermetrar frá matr. nr. 289a í Miðvági, leggja tað í eitt nýtt matr.nr. og tinglesa tað, sum ogn hjá Jógvan Hans Hansen og Haldis Hansen.

Málið er fyrr viðgjørt í býráðnum, men tað var komin tann misskiljing í at hildið var at frábýtta økið skuldi leggjast aftur at grundstykkinum matr. nr. 12d.

Býráðið frámælti av hesi orsøk, og hevur umsøkjarin tí eftirfylgjandi sett seg í samband við umsitinhgina, og biðið um at fáa umsóknina viðgjørda av nýggjum.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Parturin, ið ætlanin er at frábýta, og leggja í eitt nýtt matr.nr. liggur í øki, sum liggur í eini framtíðarætlan um útstykking. Um parturin verður frábýttur og lagdur í eitt nýtt matr.nr. kemur hetta ikki at verða í vegin fyri hesi møguligu framtíðar útstykking, tí tá kann økið lættliga keypast, sum ein lutur, ið liggur innanfyri ætlaðu útstykkingina.

**Tekniska nevnd 08. juni 2021:**

Viðmælt

**Býráðið 22. juni 2021:**
Ásla Leila Johansen luttók ikki í viðgerini.

Viðmælt.

Formansváttan:____________

## 102/21 Umsókn um byggiloyvi matr. nr. 4u í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.06.2021 | 64/21 |
| 2 Býráðið | 22.06.2021 | 102/21 |

### Málslýsing:

Eigarin av matr. nr. 4u í Sandavági hevur søkt um byggiloyvi til sethús. Søkt verður um at byggja tættari vegin enn 2,5 m. Eitt horn á bilhúsinum kemur at vera 2m frá vegi.

### Viðmerkingar frá umsitingini:

Umsitingin hevur byggimálsviðgjørt umsóknina og er einasta viðmerking at horni á bilhúsinum kemur nærri vegi enn 2,5 m

### Tekniska nevnd 08. juni 2021:

Viðmælt.

### Býráðið 22. juni 2021:

Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 103/21 Umsókn um byggiloyvi Dagmarsgøta 12 matr. nr. 287i í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.06.2021 | 65/21 |
| 2 Býráðið | 22.06.2021 | 103/21 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr. nr. 287i í Miðvági søkir um byggiloyvi til sethús.

Húsini søkt verður um loyvi at byggja hevur 3 búðeindir.

Umsitingin hevur byggmálsviðgjørt umsóknina, og er alt í lagi uttan tað at tríggir bústaðir eru í húsunum.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Ásetingarnar í byggisamtyktini siga greitt, at einans er loyvt at byggja sethús við upp til tveimum bústaðum, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, punkthús, rað- og ketuhús o.t. til eitt húski.

Nevndin má tí takað støðu til um hon vil mæla til, at frávik skal verða loyvt.

**Tekniska nevnd 08. juni 2021:**

Viðmælt við tí treyt at parkeringspláss verða til 6 bilar á matriklinum.

**Býráðið 22. juni 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 104/21 Skipan av barna- og ungdómstilboðið í Vága kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 07.06.2021 | 52/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 11.06.2021 | 65/21 |
| 3 Býráðið | 22.06.2021 | 104/21 |

**Málslýsing:**

Borgarstjórin ynskir at endurskoða barna- og ungdómstilboðið í Vága kommunu. Í hesum sambandið varð ein arbeiðsbólkur settur at gera eitt tilmæli um skipan av barna og ungdómstilboðið í Vága kommunu. Arbeiðsbólkurin er liðugur og hevur handað borgarstjóranum sítt tilmæli.

Arbeiðsbólkurin legði tilmæli fram fyri Mentanar- og trivnaðarnevndini 7. juni 2021.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 07. juni 2021:**

Nevndin tekur undir við tilmælinum frá arbeiðsbólkinum og mælt verður til, at borgarstjórin fær heimild til at arbeiða víðari út frá tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. juni 2021:**

Mælt verður til at geva borgarstjóranum heimild at seta ein verkætlanarleiðara at arbeiða við tilmælinum frá arbeiðsbólkinum.

**Býráðið 22. juni 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við Fíggjarnevndini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

**105/21 Broyting av byggisamtyktini fyri partar av matr. nr. 227a, 227d, 227e, 227f, 227g, 227h og 227i í Miðvági**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.06.2021 | 71/21 |
| 2 Býráðið | 22.06.2021 | 105/21 |

**Málslýsing:**

Nýggja útstykkingin við Gudmundargøtu er liðugt avgreidd frá Umhvørvisstovuni, men nú vísir tað seg at galdandi byggisamtykt ikki samsvarar við útstykkingina. Neyðugt verður tí at broyta byggisamtyktina fyri partar av grundstykkjunum, og økinum uttanum.

Talan verður um at broyta byggisamtyktina frá øki F-Almenn frítíðarøki til øki B-Byggiøki/sethús.

Eisini verður neyðugt at heita á landstýrismannin um loyvi at stytta hoyringsfreistina, fyri at fáa broytingina framda so skjótt, sum møguligt.

Hetta kann gerast sambært § 6, stk. 6 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013.

Kort, ið vísir broytingina er viðheft, sum skjal í málinum. Talan er um at leggja økið, sum er víst við gulum, afturat øki B-Byggiøki/sethús.

**Tekniska nevnd 18. juni 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 22. juni 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd.

Formansváttan: ____________

## 106/21 Áheitan á býráðið, at geva borgarstjóranum heimild at bjóða øki út til fjølltáttaða íbúðarbygging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.06.2021 | 71/21 |
| 2 Býráðið | 22.06.2021 | 106/21 |

**Málslýsing:**

Nú bústaðarpakkin er samtyktur er áhugin vaksin munandi fyri at byggja íbúðir kring landi. Rósa Samuelsen heitir á býráðið um skjótast tilber at geva borgarstjóranum heimild at bjóða øki út til fjølltáttaða íbúðarbygging.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 22. juni 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við Fíggjarnevndini.

Formansváttan:____________

## 107/21 Útbjóðing av arbeiðinum at gera 2. byggistig av skúlanum á Giljanesi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.06.2021 | 72/21 |
| 2 Tekniska nevnd | | |
| 3 Fíggjarnevndin | | |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.06.2021 | 72/21 |
| 5 Býráðið | 22.06.2021 | 107/21 |

**Málslýsing:**

Bygginevndin fyri Skúlan á Giljanesi mælir til, at bjóða arbeiðið at gera 2. byggistig út í almennari licitatión, sum høvuðsarbeiðstøka.

Ætlanin er at bjóða arbeiðið út 23. august 2021

**Tekniska nevnd 18. juni 2021:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2021:**

Viðmælt.

**Býráðið 22. juni 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við Teknisku nevnd.

Formansváttan:___________

# 108/21 Støðutakan til tilboð uppá niðurtøku av parti av gamla skúlabygninginum á Giljanesi, og hitaverk til ítróttarhøllina.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.06.2021 | 73/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | | |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.06.2021 | 73/21 |
| 4 Býráðið | 22.06.2021 | 108/21 |

**Málslýsing:**

Bygginevndin fyri Skúlan á Giljanesi, vil hava býráðið at takað støðu til tilboðið uppá niðurtøku og hitaverk.

Fýra fyritøkur vóru bodnar við at bjóða, men bert eitt tilboð kom inn, og var tað soljóðandi:

Niðurtøkuarbeiðið Kr. 1.274.617,96 uttan mvg

Hitaverk Kr. 1.212.586,57 uttan mvg

**Tilsamans Kr. 2.487.204,53 uttan mvg**

Ráðgevararnir mettu kostnaðin at blíva **Kr. 1.320.000,00** uttan mvg.

Bygginevndin mælir til at havna tilboðnum, tí mett verður at kostnaðurin er ov høgur.

**Tekniska nevnd 18. juni 2021:**

Tekniska nevnd tekur undir við bygginevndini.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2021:**

Nevndin mælir til at taka undir við bygginevndini.

**Býráðið 22. juni 2021:**

Einmælt samtykt at taka undir við bygginevndini.

Formansváttan: ______________

VÁGA KOMMUNA

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 18:55

Bjarni Prior

Martin Simonsen

Dagbjørn Hansen

Heðin Poulsen

Jónhard Selfoss

Tórdis Dam Johannesen

Ásla Leila Johansen

Jóhannus Hansen

Jens Gaardlykke

Jóanis Albert Nielsen

Herborg Gaardlykke

Formansváttan:__________